## DAGSINS MEINING

# Vit kunnu fyribyrgja!

Hvat kunnu vit gera fyri at verja okkum ímóti eldsbrunum? Henda spurningin hava uttan iva mong sett sær sjálvum og øðrum síðani seinasta vikuskiftið, tá ein syrgiligur eldur kravdi tvey mannalív – tveir smádreingir, sum ongan møgueika høvdu at koma úr flammuhavinum.

Sjálvandi kunnu vit tryggja okkum á ymiskan hátt, uttan at tað er sagt, at vit sleppa undan slíkum syrgiligum vanlukkum, at hús brenna í grund og at fólk brenna inni. Summi fyribyrgingartiltøk kann hvørt húski gera í sínum lagi. Onnur tiltøk kunnu t.d. tryggingarfeløg gera.

Millum annað kunnu øll húsarhald fáa sær roykvarnarar, sum helst skulu vera samanbundnir. Tað merkir, at tá ein boðar frá, so boða allir frá. Eisini kunnu húski hava eldsløkkjarar á lofti og í neðra. Eisini ber til at hava eitt brunareip uppi á loftum, ella brunastigar uttan á klædninginum frá loftsvindeyga og niður til lopshædd. Slíkar hava summi hús.

Hetta eru fyribyrgingartiltøk, sum ikki kosta so nógv, um vit sammeta við húsaprísir, ella tá bygt verður, men skulu eldsløkkjarar og brunastigar keypast, so er talan um nakrar túsund krónur. Spurningurin er tí, um slík brunaútgerð ikki átti sloppið undan meirvirðisgjaldi.

Eftir eldin síðsta vikuskiftið hevur verið róð upp undir, at tryggingarfeløgini kravdu, at fólk høvdu roykvarnarar. Um tað skal verða eitt krav ella ikki, er ein spurningurin, sum tryggingarfeløg og landsstýrið kunnu umrøða, men í øllum førum áttu tryggingarfeløgini at mælt fólki til at fáa sær roykvarnar, ella latið føroysku húsunum slíkar, tá tey tryggja seg. Einki er at ivast í, at slíkir kunnu fyribyrgja vanlukkum.

Ein annað mál, sum er umrøtt síðani vikuskiftið, eru tær vandamiklu cellotex-pláturnar, sum húsasmiðir brúktu í mong ár. Flestu hús frá 50-, 60- og 70-árunum hava hesar plátur á bróstunum. Hesar elva til, at eldur tekur dik á seg og at gass tekur seg upp.

Tá tryggingarfeløg og brundaumsjónin vita, at nógv hús hava hesar eldfimu pláturnar á bróstunum er spurningurin, um tryggingarfeløg og myndugleikar ikki áttu eggja fólki til at tikið hesar bleytu pláturnar niður og sett aðrar í staðin. Tað er kanska serliga pensjónistar, sum búgva í húsunum frá hesi tíðini, s hetta kundi verið gjørt við eini skipan, so fólk fingu lagalig lán til hesar umvælingar, sum høvdu bøtt trygdina í húsunum.

Hetta er spurningar vit eiga at umrøða eftir ta seinastu syndarligu vanlukkuna, sum vit øll hugsa um við djúpari samkenslu.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Genturóðurin má broytast

**Vagnur Michelsen**



Róðrarárið 2002 er nú farið at halla.

Fimm róðrar eru rógvnir, og tveir FM vinnarar eru funnir. Sílið, 5-mannafarið við gentum, og Jarnbardur, 6-mannfarið við kvinnum, hava áðrenn ólavsøkuróðurin vunnið FM heitið. 6 mannafarið við monnum Smyril úr Vági er mestsum eisini føroyameistari og somuleiðis 8 mannafarið Kvívíkingur.

10 mannafarsróðurin og 5 mannafarsróðurin við dreingjum verða óvanliga spennandi á ólavsøku, tí í báðum róðrunum kunnu fleiri bátar vinna FM heitið.

Bátar, sum hava mist møguleikan at vinna FM heitið, síggja sær møguleikan at vinna á ólavsøku, tí at vinna á ólavsøku er sum at vinna eina steypafinalu, og tá er kappróðrarárið bjargað.

Kappróðurin í summar hevur gingið væl, og tað hevur gingið sera væl at avgreiða róðrarnar higartil í ár. Ja, fleiri rógvarar halda, at startdómararnir eru nú mestsum ov grammir at starta bátarnar. Dreingir, gentur, kvinnur og menn, sum skulu skiftast um bátarnar, fáa næstan ikki tíð at hita upp, áðrenn startskotið er farið. Orsøkin er eisini, at í ár eru fleiri 1000 metraróðrar, sum eru skjótari at avgreiða.

Í tíðarskeiðinum 1964 til 1972 var skipað fyri einum róðri um árið til tess at finna føroyameistaran, men í 1973 varð hetta broytt soleiðis, at stig verða givin seks teimum fyrstu bátunum.

Áðrenn 1975 vóru bert fýra bátastøddir. 5-mannafør við gentum og dreingjum, 8-mannafør og 10 mannafør. Í 1975 byrjaðu menn at rógva við 6-mannaførum, og í 1983 róðu kvinnur fyrstu ferð FM róður í hesi bátastødd.

Fyrstu árini vóru 6-mannaførini ikki nógv í tali, men við tíðini vórðu fleiri 6-mannafør smíðjað.

**Genturóðurin má broytast**

Á seinasta aðalfundi hjá Róðrarsambandinum varð samtykt, at næsta ár skulu rógvast sjey FM róðrar, og royndir eru eisini gjørdar við barnaróðri. Endamálið er at vekja enn meiri um áhugan fyri kappróðrinum.

Men Róðrarsambandið eigur fyrst og fremst at broyta órættvísa genturóðurin.

Hjá dreingjunum er tað soleiðis, at ein drongur, sum fyllir 18 ár áðrenn 1. mai í kappingarárinum, hevur ikki loyvi at rógva við einum 5-mannafari. Hjá gentunum er einki aldursmark. Tað vil siga, at ungar gentur, sum fyrstu ferð fara í ein kappróðrarbát flaggdagin 25. mai, longu fimm vikur seinni skulu kappast um FM-heitið ímóti kvinnum í 20 árunum, og sum hava róð kapp í fleiri ár.

Hetta er at gera mismun millum gentur og dreingir og tænir ikki ítróttarliga endamálinum, har fólk skulu kappast á jøvnum føti.

Tær ungu genturnar skulu í fimm vikur læra seg áralag, venja seg at rógva 1000 metrar, læra seg fyrstu tøkini í FM róðrinum, hava ein góðan miðróður, hava orkuna í endasróðrinum og læra mangt annað, sum er knýtt at einum FM róðri.

Hetta letur seg slett ikki gera, og tí fáa vit ein ójavnan genturóður við 14-18 bátum, har tað eru 20-30 bátslongdir millum fyrsta og aftasta bátin. Er talan um tíðina, so eru onkuntíð ein til tveir minuttir millum fremsta og aftasta bátin.

Tað verður kastað lut um, hvussu bátarnir liggja á norðoyastevnu. Á næstu stevnu liggja so teir bestu bátarnir frá norðoyastevnu í miðjuni. Tað vil siga, at genturóðurin oftast myndar eitt (har bátarnir í miðjuni liggja fremstir og bátarnir við teimum ungu gentunum eru uttastir og aftastir.

Róðrarsambandið eigur beinanvegin at broyta gentu- og kvinnuróðrarnar soleiðis, at vit longu næsta ár hava 5-mannafør við gentum, sum ikki eru fyltar 18 ár áðrenn 1. mai í kappingarárinum, 5-mannafør við kvinnum og 6-mannafør við kvinnum.

Ein annar møguleiki er, at kvinnur eisini rógva í 8-mannaførum, so gentu- og kvinnumanningarnar eru 5-mannafør við gentum, sum ikki eru fyltar 18 ár áðrenn 1. mai í kappingarárinum, 6-mannafør við kvinnum og 8-mannafør við kvinnum.

Tað er altavgerandi, at ungar gentur, sum fyrstu ferð rógva kapp, ikki beinanvegin kappast ímóti "garvaðum" rógvarum. Tær skulu helst ikki missa mótið á fyrstu stevnu.

Til stuttleika kann nevnast, at tað er lítil og eingin munur í stødd og vekt á einum 6-mannafari og einum 8-mannafari, tí kunnu kvinnur eisini rógva 1000 metrar í einum 8-mannafari. Tá er munurin í stødd størri á einum 5-mannafari og einum 6-mannafari. Nevnast kann, at eitt nýtt 5-mannafar vigar 190 kg, nýtt 6-mannafar 225 kg og nýtt 8-mannafar 255 kilo.

**Alt verður hugaligari**

Úrslitið av broytingini verður, at vit fáa ein genturóður afturat, men vit fáa eisini tveir nýggjar meiri spennandi róðrar við ikki so nógvum bátum. Tað er eingin meining í at nýta nógva tíð at starta 14-18 so ójavnar gentubátar.

Tær ungu genturnar skulu fáa eitt positivt upplivilsi, tá ið tær fyrstu ferð koma inn í rógviítróttina, tað fáa fleiri manningar ikki í dag.

Mær er sagt, at Róðrarsambandið vil ikki at broyta genturóðurin, tí so fáa tær smáu bygdirnar ikki manna bátarnar. Jú, sjálvandi fáa tær mannað bátarnar, um hugur og vilji er til tess, men nú fáa tær tveir møguleikar at velja ímillum. Ganga genturnar í 9. ella 10. flokki, so manna tær eitt 5-mannafar við gentum. Eru tríggjar gentur møguliga ov gamlar, so manna tær eitt 5-mannafar við kvinnum, so einfalt er tað.

Soleiðis skal og eigur tað at vera. Alt annað er órættvíst, at gera mismun og ikki góður ítróttarandi í hesum javnstøðudøgum.

Onkur hugsar kanska, at í nýggju skipanini skulu tríggjar manningar í onkrum førum nú skiftast um eitt 5-mannafar, men hetta er ikki neyðugt. Tað er ikki so kostnaðarmikið at byggja eitt nýtt 5-mannafar til ungu genturnar. 5-mannafarið kostar 55000 krónur, og tað plagar ikki at skorta at útvega pening, tá ið nýggir bátar skulu útvegast kring landið. Kanska fara fleiri ungar gentur at bjóða seg fram næsta ár?

Sjálvandi skulu vit broyta genturóðurin longu næsta ár.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktíonin:**
tel. 220507 tel. 333843
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Tá kunningarstovuleiðari verður politikari

**Jógvan við Keldu**
*tingmaður fyri Norðoyggjar*



Ónøgdin hjá mær var mest grundað á, at Strandferðslustjórin ikki vildi samvirka við vinnulívið, ferðafólkið og kundar annars í 1998.

Tað kann gerast eitt sindur óheppið, at kunningarstovuleiðarin í Norðoyggjum og eg umboðandi Norðoyggjar bæði á tingi og í øðrum høpi, fara út í blaðstríð, tí báðir hava hóast alt somu ynski fyri okkara økið.

Hinvegin verði eg noyddur at koma við einum svari til tað, sum Christian Olsen, sum er kunningarstovuleiðari, skrivar í Sosialinum seinasta týsdag.

Í mínum innleggum, sum bert var lítil partur av ónøgdini, sum hevur verið frammi í Sosialinum, vísti eg serliga til arbeiðsbólkin tann sokallaða Leirvíksfjarðabólkin - sum varð settur í 1998 eftir vilja Klaksvíkar býráðs, vinnulívinum og eg haldi eisini sjúkrahúsið var við í fundarvirkseminum tá, og sum kundi virkað okkum til fyrimuns.

Hetta komst av, at vit ikki góðtóku vánaligu tænastuna, sum Strandferðslan gav Norðoyingum, vinnulívi, og ferðafólki, ið komu til Norðoyggjar.

**Vildi ikki samvirka**

Tað sum síðani hendir er, at Strandferðslan stutt eftir tekur síni umboð úr bólkinum. Ikki Christiani at siga, tá gerst ein tílíkur abreiðsbólkur nakað tannleysur.

Strandferðslustjórin er komin við sínum sjónarmiðum, um hví hann tók umboðini úr bólkinum, hann "vildi ikki finna seg í, at onnur komu inn á teirra øki", tí vildi Strandferðslan ikki samstarva við kundar og viðskiftafólk, sum dagliga brúka rutuna, og tí hava skil fyri gerandisdegnum á hesum øki. Hetta er skilaleyst.

At Christian Olsen leiðari fyri Norðoya Kunningarstovu verjir eina tílíka gerð, er bæði óskiljandi og betonkiligt. Mong, bæði innan vinnulívið, sjúkrahúsverkið, mentanarlívið og kundar annars, standa eftir viðmerkingina í Sosialinum hjá kunning-arstovuleiðaranum, spyrjandi.

**Álop kunningarstovuleiðarans á Fólkaflokkin**

Kunningarstovuleiðarans álop á Fólkaflokkin eru uttan iva eitt høvi hann hevur bíða eftir, tí hann hevur bæði verið uppstillaður og sitið í býráðnum fyri Javnaðarflokkin, og tí eri eg ræddur fyri, at hann í hesum føri hevur verið meiri politiskur enn "kunningarstovuligur".

Mær nýtist ikki at verja Óla Breckmann, tað geri eg heldur ikki. Mær nýtist heldur ikki at siga, hvat Fólkaflokkurin Bjarni Djurholm og Finnbogi Arge - hevur virkað Norðoyggjum at frama bæði við arbeiðinum við fasta sambandinum og við royndum at fáa eina játtan til avloysaraskip, uttan at hava fingið meiriluta fyri tí. Men møguliga fæst semja um hetta.

Christian Olsen leiðari í Norðoya Kunningarstovu eigur at minnast til, at siðvenjan frá tí hann vísir til, tá hann tosar um "reiðrið", ið var, og til í dag er heilt hvør sín. Skal ein landsstýrismaður játta pening, má fyrst fáast semja um tað í landsstýrinum og síðani skal í hvussu er fíggjarnevndin góðkenna játtanina, og í øðrum lagi løgtingið.

Eg haldi til seinast í hesum viðfangi, at tað er ein bæði grov og óhøvisk skuldseting ímóti ferðslumálaráðharranum, tá leiðarin fyri Norðoya Kunningarstovu sigur at Strandferðslan ikki hevur fingið nakran sum helst stuðul frá landsstýrismanninum. Hetta er bæði óvísiligt og ósatt, umframt at tað er lítið umhugsað. Eg rokni ikki við, at Strandferðslustjórin er samdur við Christiani í hesum.

Álop javnaðarmansins á Fólkaflokkin fari eg í fyrstu syftu at lata standa ósvarað.

# Spennandi útferðir og annar samankomstur hjá pensjónistum

TÍÐINDASKRIV

Tann 21. til 27. juli koma pensjónistar av Álandi, úr Finnlandi, Svøríki, Noregi og Danmark at vera saman við føroyskum pensiónistum. Teir skulu búgva á Skúlaheiminum í Havn, men ferðast runt oyggjarnar allar dagarnar. Bert fyri at nevna nøkur pláss: Havnin, Kirkjubø, Saksun, Gjógv, Funning, Gøtu, Fuglafjørð, Klaksvík og Viðareiðis. Í Fuglafirði verður norðurlendskt gudstænasta við Emil Olsen, presti, tann 25. juli kl. 17.00. Borgmeistarin í Havn setur stevnuna. Næsta ár verður hendan stevnan hildin í Finnlandi.

Longu tann 3. august møtast tey aftur, tá verður tann árligi »Eldradagurin« hildin. Hann verður í ár hildin í Ítróttarhøllini í Vestmanna, har Vesturskin og Landsfelag Pensjónistanna stíla fyri. Seinast bleiv dagurin hildin í Leirvík. Næsta ár er ætlanin at halda dagin í Vágum.

6. august fara o.u. 22 pensjónistar til Løgstør í Danmark at vitja. Hetta er eftir innbjóðing frá pensjónistafelagnum har. Tey, ið fara, vænta ein spennandi túr burtur úr hesum.

Tann 14. sept. verður so tann árliga ársveitslan hjá Landsfelag Pensjónistanna. Hon verður hildin í Ítróttarhøllini á Nabb í Havn frá kl. 17.00 til 24.00.

# Nei, Svenning av Lofti

**Hans Andreasen**

Hví so harmur, um at ein bjór kann vera gott fyri sinn og skinn? Ovurnýtsla av øllum er skaðilig. Etur tú ov nógv livradeigg ella nýtur ov nógv øl ella gert ov nógv av, tá ið talan kemur til tað andaliga, so er hetta jú sera vandamikið.

At tú nýtir Sinnisbata sum eina umbering í tínum lesarabrævi í Dimmu 17.07., er sera undrunarvert. Hví ikki vera erligur og siga sum er, at tú hatar alt, ið inniheldur alkohol?

Og at nógvir alkoholikarar eru endaðir á Psykiatrisku deild er sjálvandi syrgiligt, men so sanniliga nógvir av fundamentalistunum eru eisini endaðir á Psykiatrisku deild, minst tú til tað. Og einki er at ivast í, at teir eru verri at fáa á rættan kjøl aftur.

Fundamentalistarnir her á landi eru meira skaðiligir enn nakað alkohol.

Havi lurtað eftir Lindini nakrar ferðir, og tað má eg siga, eina slíka gudsspottan havi eg aldri hoyrt fyrr. Somuleiðis haldi eg, at tað er sera undrunarvert, at henda útvarpsstøð ikki verður sensurerað.

Útlendskir trúboðarar floyma inn í landið. Fólkið liggur og siglir niðri á øllum fýra í ymiskum ítróttarhallum kring landið. Pengaterminalar eru uppsettir, so hevast kann dúgliga til hesar trúboðarar, sum fara av landinum aftur proppaðir við »kristnum pengum«.

Tú skalt minnast til eitt, at vit eru fleiri, ið kunnu njóta eina bjór ella báðar tvær uttan at enda sum ein grønert.

Nei, Svenning, sum støðan sær út til, verður ikki leingi, til Føroyar verða eitt satt kristið TALIBAN veldi.

# Sukurfrítt fitar

**Nýggj gransking staðfestir, at sukurfríar vørur og lightvørur fita ístaðin fyri at klænka**

NÝGGJ VITAN
*Turið Kjølbro*

- Hevur tú ætlanir um at tapa teg, skalt tú ikki eta ella drekka sukurfríar vørur og vørur við frámerkinum light. Tær fita meiri enn tær klænka. Ávís eftirgjørd søtievni snýta bert blóðið og heilan fyri sukur, so matarlysturin veksur, staðfestir nýggj gransking.

Lightvørurnar fita, tí nógvar innihalda søtievnið aspartam, eisini kallað nutrasweet. Kroppurin heldur, at hann fær sukur, men verður snýttur við eftirgjørdum søtievni. So fellur blóðsukrið og matarlysturin veksur. Tað kann gera fólk enn tjúkkari, um tey eta feitan mat ístaðin fyri sukur. Feitt er meiri fitandi enn sukur.

Søtievnið aspartam og onnur søtievni finnast í ørgrynnu av mat- og drekkivørum, t.d. Coca-Cola light og øðrum sodavatni, í jogurt, saft, súltitoy, ísi, góðgæti, dessertum og øðrum.

At vørur við frámerkinum light fita heldur enn klænka er nýtt fyri nógv, eisini onkran teirra, sum í fleiri ár hevur havt klænkiskeið í Føroyum.

- Spyr onkur skeiðluttakari meg, hvørjar matvørur tey skulu keypa, mæli eg altíð fólki til at lesa væl á etikettini, hvat viðkomandi vøra inniheldur. Eisini havi eg mælt fólki til at eta light. At light fitar meiri enn tað klænkar er nýtt fyri meg, sigur ein skeiðhaldari í Føroyum.

Áður hevur sterka søtievnið aspartam, sum er 200 ferðir søtari enn sukur, verið illtonkt fyri at elva til krabbamein. Hetta er eitt páhald, sum ongantíð er prógvað. Henning Pakkenberg mælir parkensonssjúklingum frá yvirhøvur at røra mat, sum inniheldur aspartam, tí evnið verður hildið at elva til parkensonssjúkraeyðkenni. Niðurstøðan má vera: et minni feitt og meiri grønt!


**Summarfrí**

Vegna summarfrí verður virkið stongt frá 20. juli til 11. august.

Átrokandi boð verða avgreidd á tlf. 218534.

Vit ynskja viðskiftafólki okkara eitt gott summar.

**Sp/f Hans Dam**
Rør- og blikksmiður

Sethúsaklædningur



Plastik er á goymslu

Slitsterkur & viðlíkahaldsfríur

pf Klement Petersen

Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

Sosialurin
-tað loysir seg